

Norski tjóðbankastjórin, Øystein Olsen. mynd: Norges Bank

# Tað var gott at oljuprísurin lækkaði

**Jógvan Hugo Gardar**

11.05.2015 - 10:01

Oljan.fo

Norski tjóðbankastjórin, Øystein Olsen, segði undir eini vitjan í norska oljuhøvuðsstaðnum Stavanger, at tá hann tók samanum, so var tað helst gott at oljuprísurin for at lækka fyri einum ári síðani.

- Tá vit hyggja eftir oljuprísinum, so er kanska líka gott at vit fingu hetta høvi til at gera neyðugar tillagingar heldur enn at halda at hendan inntøkan veksur inn í himmalin, segði Osen, sambært Dagens Næringsliv.

Hann kom við hesum boðskapinum á einum fundi saman við lesandi í Stavanger, har tey uppliva at arbeiðspláss hvørva, ognógv av teimum sum trúðu at oljuídnaðurin kundi tryggja teirra lívsleið, tey mugu nú tillaga sínar ætlanir. Arbeivsloysi økir í Noregi, og fleiri staðni lækkar húsaprísurin eisini.

Tjóðbankastjórin fekk ein spurning um hann helt at Statoil-leiðslan var samd í at tað var gott at oljuprísurin lækkaði.

- Tað er eg ikki vísur í. Svarið er ikki eitt ja ella nei. Men eg haldi, og havi eisini hoyrt fólk í oljuídnaðinum siga tað, at ein tillaging av kostnaðarstøvinum óansæð var neyðug, segvi Øystein Olsen.